# Ólavur og Kristian í Suður Afrika

**Í hesi vikuni luttaka gittarleikarin Ólavur Jakobsen og tónaskaldið Kristian Blak á New Music Indaba 2008 í Pretoria í Suður Afrika**



*Ólavur Jakobsen, guitarleikari*

**TÓNLEIKUR**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Felagið Føroysk Tónaskøld hevur í 2008 havt samstarv við Tónaskaldafelagið í Suður Afrika, har ið tónaskøld hava vitjað í Føroyum, og føroyskir tónleikarar hava framført tónleik teirra í samband við tónleikafagnaðin Summartónar.

New Music Indaba er teirra komponistafestivalur, at líkna við okkara Summartónar í Føroyum.

Ólavur hevur framført solokonsertir við m.a. verkum eftir føroysk tónaskøld. Harafturat hevur hann havt master-class við gittarlesandi á Lærda Háskúlanum í Pretoria.

Konsertir verða í Johannesburg, har ið Ólavur, umframt soloframførslu, leikar saman við limum í Johannesburg Symphony Orchestra.

Kristian umboðar Felagið Føroysk Tónaskøld, og hevur havt verkskeið við vitjandi tónaskøld og tónleikarar.

Nógvur føroyskur tónleikur verður eisini framførdur av gestandi tónleikabólkunum.

Sambandið við New Indaba Music og Suður Afrika, er komin í lag gjøgnum altjóða virksemi í ISCM, ið er altjóða felagskapur fyri tónaskøld.

Á seminar í Bolivia 2005, har Kristian Blak luttók, varð hugskotið kveikt.

Slíkt altjóða virksemi fær føroyskan tónleik, tónaskøld og tónleikarar fram uttanlands, og er til at fremja áhugan á altjóða tónleikapallinum fyri, hvat føroyskur tónleikur hevur at bjóða.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi, seinnapartin minni vindur. Stundum regn ellas mjørki og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og regn ella mjørki. Um kvøldið minni vindur og ælingur. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 8 og 12 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 19 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 19 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 27 |
| Athen | -- |
| Malta | 33 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 16 |
| New York | 27 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 29 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 17 |

### LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 998 hPa. í útsynning úr Írlandi fer í landnyrðing norðan og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikudagin.



**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Hebridunum fer spakuliga norðureftir. Lágtrýstið á 52N-27V, ex ódnin »HANNA« fer í landnyrðing og verður væntandi skamt í útsynning úr Føroyum hósdagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/08 kl. 06[00] – 25/08 06[00]. Hitin í gjár: 12,1°
Minsti hiti máldur í september: 0,4° - Mesti hiti máldur í september: 20,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 22,0 mm – mált frá 24/08 kl. 06[00] – 25/08 06[00].
Avfallið higartil í september: 119 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

26. august — Mánin næstur jørðini
30. august — Tendring
7. september — Fyrra kvarter / Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. sept | 2:59 | 15:21 | 1:59 | 14:21 | 2:14 | 14:36 | 4:59 | 17:21 | 5:59 | 18:21 | 1:14 | 13:36 | 0:14 | 12:36 | 3:14 | 15:36 | 4:14 | 16:36 | 2:44 | 15:06 | 3:59 | 16:21 |
| 10. sept | 3:44 | 16:06 | 2:44 | 15:06 | 2:59 | 15:21 | 5:44 | 18:06 | 6:44 | 19:06 | 1:59 | 14:21 | 0:59 | 13:21 | 3:59 | 16:21 | 4:59 | 17:21 | 3:29 | 15:51 | 4:44 | 17:06 |
| 11. sept | 4:28 | 16:49 | 3:28 | 15:49 | 3:43 | 16:04 | 6:28 | 18:49 | 7:28 | 19:49 | 2:43 | 15:04 | 1:43 | 14:04 | 4:43 | 17:04 | 5:43 | 18:04 | 4:13 | 16:34 | 5:28 | 17:49 |
| 12. sept | 5:10 | 17:30 | 4:10 | 16:30 | 4:25 | 16:45 | 7:10 | 19:30 | 8:10 | 20:30 | 3:25 | 15:45 | 2:25 | 14:45 | 5:25 | 17:45 | 6:25 | 18:45 | 4:55 | 17:15 | 6:10 | 18:30 |
| 13. sept | 5:51 | 18:11 | 4:51 | 17:11 | 5:06 | 17:26 | 7:51 | 20:11 | 8:51 | 21:11 | 4:06 | 16:26 | 3:06 | 15:26 | 6:06 | 18:26 | 7:06 | 19:26 | 5:36 | 17:56 | 6:51 | 19:11 |

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

Alt um harmonikur

www.simme.eu

Lesið
Sosialin